Newcastle vil hava Huntelaar

Við Owen og Martins á skaðalistanum og dýra Luque sum eykamanni, hevur Newcastle at kalla kroniskar trupulleikar í kostnaðarmikla álopinum. Tað hevur nú fingið teir at venda eyguni móti Hollandi, har Klaas Jan Huntellar er væl ávegis at gerast næsti stóri álopsspælarin hjá landinum. Higar til hevur Ajax tó hildið fast um, at Huntelaar als ikki er til sølu, so ivaleyst skulu heilt nógvir pengar á borðið, áðrenn hetta gerst ein ítøkiligur møguleiki.

-mørk

Bannað at filma

Formaðurin í enska felagnum Torquay United Chris Roberts, sigur seg nú hava sæð nóg mikið av filmi, tá spælarar royna at fáa brotsspark á órættvísan hátt. Hann hevur soleiðis sett í verk nýggja reglugerð, og sambært hesi verða spælararnir hjá Torquay revsaðir, um teir royna at filma seg til fyrimun. Fyrstu ferð verður talan um ávarin, aðru ferð ávaring og bót og heldur hetta fram, verður spælarin settur til sølu, ella snøgt sagt koyrdur úr starvi sínum.

-mørk

Ferguson var skelkaður

Venjarin hjá Manchester United, Sir Alex Ferguson, var alt annað enn nøgdur um tapið móti Celtic.

– Eg eri skelkaður. Skal eg vera púrasta erligur, so er tað trupult at góðtaka, at vit taptu hendan dystin. Men tað er tað, sum hendir, um tú ikki skorar. Snøgt sagt, so vóru vit ikki nóg hvassir á seinasta triðinginum av vøllinum, og tað kostaði okkum dýrt, segði venjarin.

Og nakað var so um tosið. Manchester United hevði fleiri góðar møguleikar í dystinum, men teir vórðu allir misnýttir. Eisini brotssparkið, sum Louis Saha skeyt í seinasta minuttinum.

-mørk

Vónbrotin Ståle

Tvey mál til Benfica innan fyri bara tveir minuttir oyðiløgdu allar vónir hjá FCK um víðari luttøku í Champions League. Og tað var ikki nakað, sum hóvaði FCK-venjaranum serliga væl.

– Vit byrja dystin væl, og sjálvur hevði eg eina góða kenslu fyrstu løtuna. Vit hava eisini ein góðan møguleika, tá Grønkjær leggur inn til Hutchinson, men ístaðin koppar alt, tá teir skora tvær ferðir innan 90 sekund, segði Ståle Solbakken.

Og so kundi venjarin heldur ikki lata vera við at iðra seg um, at Celtic vann sín dyst.

Úrslitini týskvøldið bera nevnliga við sær, at FCK heldur ikki hevur møguleika at røkka triða plássið í bólkinum. Hetta gevur annars atgongd til luttøku í UEFA-Cup, men tann møguleikan fær FCK so ikki.

-mørk

Ensku umboðini í vanda

FCK gleið í svinginum, og eftir tvey tap á rað er Manchester United er nú brádliga í vanda. Tað er støðan í spennandi bólki F, har einki verður avgjørt fyrr enn á seinasta leikdegi, og tað sama er støðan í bólki G, har Arsenal hevur sera trupla uppgávu

FÓTBÓLTUR

Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Dreymurin hjá FCK um enn fleiri Champions League milliónir brast, tá teir í gjár spældu útidyst móti Benfica.

Dysturin endaði 3-1 til portugisiskur vertirnar, sum allan dystin á tamb høvdu eina greiða yvirvág. Longu eftir góðum korteri stóð 2-0 á talvuni, og so var at kalla liðugt hjá FCK. at Marcus Allbäck móti dystarenda minkaði um munin, gjørdi ikki tað heilt stóra fyri FCK, sum tó kann líta aftur á eina luttøku, sum í nógvar mátar hevur verið framúr vælegnað. Fíggjarliga hevur felagið í fleiri ár verið so nógva tað sterkasta í Danmark, og tann støðan verður bara styrkt við luttøkuni.

Men eisini ítróttarliga hevur hetta munað væl. Bara slíkar avbjóðingar gera tað munin lættari at fáa fatur á sterkum útlendskum spælarum, og so skerst ikki burtur, at úrslitini á heimavølli hava verið góð. Har hevur FCK nevnliga enn ikki tapt.

Ensk umboð undir trýsti

Við sigrinum helt Benfiac fast um sín møguleika at koma víðari, og tann spurningurin verður avgjørdur í seinasta umfarinum, tá teir vitja á Old Trafford.

Og eins og tað var í Lissabon fyri júst einum ári síðani, so er aftur talan um lagnudyst millum Manchester United og Benfica. Annan dystin á rað máttu reyðu devlarnir hjá Sir Alex Ferguson nevnliga lúta, og eftir framúr byrjanina við níggju stigum í trimum dystum eru teir nú brádliga í vanda fyri at missa rættin til víðari luttøku. Hesa var eitt einsamalt fríspark frá japanska Nakamura nóg mikið hjá Celtic, sum nú kann standa seg við javnleiki í seinasta dystinum, sum er í Parkini móti FCK.

Louis Saha og Shunsuke Nakamura høvdu hvør sin høvuðsleiklut í bretsku uppgerðini týskvøldið. Nakamua gjørdist hetjan, tá hann skoraði einsamalla málið við beinleiðis frísparki. Saha misnýtti brotsspark í yvirtíðini

Mynd: Scanpix

Og tað saman er galdandi fyri Arsenal, sum í fjør spældi finaludyst í kappingini. Enskur fótbóltur hevur annars staðið seg framúr væl seinnu árini, men eins og Manchester, so er Arsenal í stórum trupulleikum.

Týskvøldið greiddu teir tó sín setning, tá teir vunnu heimadystin móti Hamburger SV, men enn er nógv arbeiði eftir. Arsenal skal í seinasta dystinum spæla móti Porto, og har er kravið ein sigur, um kanónirnar úr London skulu vera vísar í víðari luttøku. Ikki minst tí CSKA samstundis spælir móti Hamburg, sum enn einki stig hevur vunnið.

AEK leyp framum

Í bólkunum E og H er spenningurin ikki eins stórur. Lyon og Real Madrid vóru longu komin víðari, tá dystaðust í Madrid, og tí mundu báðir partar vera so hampuliga væl nøgdir við 2-2 javnleikin.

Eisini í bólki H er oddasessurin avgreiddur, men úrslitini týskvøldið komu tó illa við hjá Lille. Hevði Lille vunnið sín væntaða heimasigur á Anderlecht, meðan Milan gjørdi sítt í Athen, var franska arbeiðið liðugt, men soleiðis gekst tó ikki. Ístaðin mátti Lille taka til takkar við javnleiki, og tá AEK vann heimadystin á longu tryggjaða Milan, eru tað nú brádliga teir, sum standa við bestu kortunum undan seinasta umfarinum.

Úrslitini týskvøldið

Bólkur E	
Real Madrid-Lyon	2-2
Steaua Bucharest-Dynamo Kiev	1-1
Bólkulr F	
Benfica-FCK	3-1
Celtic-Manchester Utd.	1-0
Bólkur G	
CSKA Moskva-FC Porto	0-2
Arsenal-Hamburger SV	3-1
Bólkur F	
AEK Athen-AC Milan	1-0
Lille-Anderlecht	2-2

Champions League, bólkaspælið

Bólkur A	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Chelsea	4	3	-	1	-	0	3	3	0	10
2 Werder Bremen	4	2	-	1	-	1	6	3	3	7
3 Barcelona	4	1	-	2	-	1	8	4	4	5
4 Levski Sofia	4	0	-	0	-	4	1	13	-12	0

Bólkur B	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Bayern München	4	3	-	1	-	0	7	0	7	10
2 Inter Milan	4	2	-	0	-	2	3	4	-1	6
3 Sporting Lissabon	4	1	-	2	-	1	2	2	0	5
4 Spartak Moskva	4	0	-	1	-	3	2	8	-6	1

Bólkur C	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Liverpool	4	3	-	1	-	0	7	2	5	10
2 PSV Eindhoven	4	3	-	1	-	0	5	1	4	10
3 Galatasary	4	0	-	1	-	3	3	7	-4	1
4 Bordeaux	4	0	-	1	-	3	0	5	-5	1

Bólkur D	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Valencia	4	3	-	1	-	0	10	5	5	10
2 Roma	4	2	-	1	-	1	7	3	4	7
3 Olympiakos	4	0	-	2	-	2	5	8	-3	2
4 Shakhtar Donetsk	4	0	-	2	-	2	4	10	-6	2

Bólkur E	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Lyon	5	4	-	1	-	0	11	2	9	13
2 Real Madrid	5	3	-	1	-	1	12	6	6	10
3 Steaua Bucharest	5	1	-	1	-	3	6	10	-4	4
4 Dynamo Kiev	5	0	-	1	-	4	3	14	-11	1

Bólkur F	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Manchester Utd	5	3	-	0	-	2	7	4	3	9
2 Celtic	5	3	-	0	-	2	7	6	1	9
3 Benfica	5	2	-	1	-	2	6	5	1	7
4 FC København	5	1	-	1	-	3	2	7	-5	4

Bólkur G	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 FC Porto	5	3	-	1	-	1	9	4	5	10
2 Arsenal	5	3	-	1	-	1	7	3	4	10
3 CSKA Moskva	5	2	-	2	-	1	2	2	0	8
4 Hamuburg SV	5	0	-	0	-	5	4	13	-9	0

Bólkur H	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 AC Milan	5	3	-	1	-	1	8	2	6	10
2 Aek Athen	5	2	-	1	-	2	4	7	-3	7
3 Lille	5	1	-	3	-	1	6	5	1	6
4 Anderlecht	5	0	-	3	-	2	5	9	-4	3